## Ala tosk á Árnafirði

Um hálvan annan mánað fer Faroe Salmon at ala tosk á Árnafirði. Ætlanin er at seta umleið 100.000 yngul út. Yngulin, sum er undan toski av Føroya Banka, hevur gingið í kørum hjá Fiskaaling. Toskurin á Bankanum veksur skjótari enn annar toskur, og hjá Faroe Salmon vænta tey, at tann fyrsti toskurin kann takast um umlið tvey ár. Roknað verður við, at toskurin fer at viga umleið fýra kilo tá, um alt gongur, sum tað skal.

*(Kelda: Norðlýsið)*

## Gott ár

Eftir tvey heldur vánalig ár vendi gongdin hjá føroysku partrolarunum í fjør, og fleiri pør fiskaðu fyri millum 25 og 30 mió. krónur. Í ár er uppaftur betur, og 2006 verður eftir øllum at døma tað besta hjá føroyska partrolaraflotanum nakrantíð. Fiskiskapurin hevur verið góður, og prísirnir hava eisini verið av teimum bestu nakrantíð. Tað sæst aftur á manningarpartinum, sum hjá teimum bestu fer at liggja um 600.000 krónur í ár.

*(Kelda: Vinnuvitan)*

# vikuna




*Í dag er SMS nógv meiri spennandi enn tað nakrantíð hevur verið og Niels Mortensen, stjóri, er serliga hugtikin av, hvussu høgum støði handlarnir eru á.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tá bygdu vit annan enda um og broytingar eru eisini gjørdar í niðastu hædd. Nú er so restin gjørd.

Umbyggingin hevur sjálvandi darvað virkseminum nakað, men ikki meir enn tey høvdu væntað og tað hevur gingið sum ætlað.

Tá ið hetta er liðugt, verður farið undir at fríðka og hampa SMS uttan og tað arbeiðið verður liðugt einaferð seint í vár.

Og nú ásannar stjórin, at møguleikarnir at byggja út eru við at tømast.

- Eg ivist í um SMS kann gerast stórt størri enn tað er nú. Tað er í hvussu so er ikki nakað, vit hugsa um nú. Nú ræður um at fáa hetta liðugt, so fáa vit at síggja, hvat framtíðin hevur at bjóða, sigur Niels Mortensen.

Tað skerst ikki burtur, at SMS er er ein sølumiðstøð, sum stendur sterkari og sterkari í hugaheiminum hjá fólki, ikki bara í Havnini, men eisini hjá fólki úti um landið.

Men hvussu síggja tey framtíðina hjá miðbýnum í Havn. Nú SMS letur uppaftur, eru eisini einir fýra, fimm handlar í miðbýnum fluttir í SMS og tað kann tykjast sum um at hann spakiliga tømist fyri handlar og lív.

- Vit hava altíð mett SMS sum ein part í miðbýnum, tí vit halda, at vit eru mitt í býnum.

Men hvønn leiklut Áarvegurin og Niels Finsensgøta fáa í framtíðar býarmyndini í Havn, er ringt at spáa um, heldur hann.

Niels Mortensen ásannar, at hetta er ein dýr útbygging, men hvussu nógv hon kostar, vil hann ikki siga.

Kortini ber til at siga, at hetta er sjálvandi eitt úrslit av, at vit hava havt blíðan byrð einastu árini og at vónirnar til framtíðina eru bjartar.

Men Niels Mortensen sigur, at tað er neyðugt at endurnýggja seg fyri at varðveita eina framgongd, so framgongd skal til fyri at kunna endurnýggja seg, men endurnýgging skal eisini til fyri at skapa framgongd.

# Eginognan hevur rundað tær 100

**Talan er kanska um sterkastu handilsfyritøkuna í landinum, sum í morgin letur dyrnar upp eftir enn eina stóra umbygging**

ROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var annars ikki tað, sum lá í kortunum, tá kreppan leikaði harðast á. SMS var eitt av virkjunum, sum als ikki megnaði at svara fíggjarligu skyldurnar, sum fyrst og fremst vóru tengdar at stóra handilsbygninginum.

Ein sanering fekk tó javnvágina í rakstrinum at koppa rætta vegin, og síðani hevur tað koryt við fullari ferð hjá Hans Mortensen og íslendska Baugur, sum eru høvuðspartaeigarar í fyritøkuni. Kravið til avkastið var munandi minni eftir saneringina. Búskaparligi aldudalurin var um at vera søga, og fyrstu fimm árini kundi felagið – eins og nógvar aðrar av føroysku fyritøkunum – njóta gott av, at saneringar undir ávísum fortreytum vóru skattafríar. Hetta tí gomul skattlig hall ikki vórðu mótroknað í betraðu eginognini, sum ein sanering gav.

### Eginogn á 100 mió

At talan í dag er um eina sera væl konsolideraða fyritøku, er eginognin besta boð um. Hendan var við árslok 2005 góðar 101 mió kr., og fyri eina handilsfyritøku í Føroyum er hetta tal ikki bara stórt. Men øgiliga stórt. Verður samstundis lagt aftur, at felagið hesi seinastu fýra roknskaparárini hevur útluta 31 mió kr. í vinningsbýti, er eingin, sum ivast í, at talan í dag er um góða forrætning, sum teir báðir Mortensen feðgarnir stjórna.

Skilnaður varð í 2003 gjørdur millum sjálvt SMS og ognirnar – les bygningin – í felagnum. Bygningurin varð seldur til Fastognarfelagið, sum SMS upprunaliga átti 90% av, men har ognarluturin hjá handilsfyritøkuni nú er 50%.

Og eisini her tykist talan vera um góða íløgu. Hóast SMS sjálvt er bundið at P/F Fastogn við eini árligari leigu upp á 13 mió kr., so vil ein slík sundurliðing alt annað líka gera tað lættari at seta kreftirnar á rætta stað í rakstrinum av SMS.

### Peningarenslið gevur møguleikar

Og hóast góðu úrslitini og stóru eginognina, so er eisini greitt, at rúm eru fyri batum í hesum. Rentingin av eginpeninginum hevur í sjálvum sær ikki verið so ovurhonds góð, sum hon áður hevur verið, og tí skal talið á botnlinjuni økjast, tí mett eftir seinastu báðum roknskapunum hevði avkastið verið hægri, um pengarnir bara stóðu á bók.

Men við einum peningastreymi upp á meira enn kvarta milliard er fyrsta fortreytin tó eisini til staðar. At peningarenslið er nóg stórt, gevur fyritøkuni hópin av møguleikum at optimera raksturin. Ein av hesum møguleikum er uttan iva umbyggingin, sum sjálvandi verður gjørd av P/F Fastogn, men har tað ætlandi er SMS sjálvt, sum fær fremsta ítøkiliga fyrimunin.

| P/F SMS | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðstøl (tkr.)** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
| Søla | 214.130 | 234.016 | 255.197 | 261.369 |
| Bruttovininngur | 45.118 | 51.650 | 45.650 | 42.080 |
| Ársúrslit | 10.054 | 10.874 | 7.914 | 4.684 |
| | | | | |
| Støðisogn | 148.841 | 54.594 | 45.799 | 54.900 |
| Ogn í umferð | 24.708 | 88.145 | 77.221 | 79.967 |
| | | | | |
| Eginpeningur | 732.304 | 98.705 | 101.620 | 101.306 |
| Fíggjarjavnvág | 173.549 | 142.739 | 123.020 | 134.867 |
| | | | | |
| **Lyklatøl** | | | | |
| Ognaravkast | 10 | 12 | 4 | 1 |
| Eginpeningsavkast | 14 | 11 | 8 | 4 |
| Soliditetur | 42 | 69 | 83 | 75 |
| Gjaldførislutfall | 104 | 200 | 361 | 240 |
| | | | | |
| **P/F Fastogn** | | | | |
| | | | | |
| **Høvuðstøl (tkr.)** | | | | |
| Ársúrslit | | | 4.157 | 4.693 |
| Støðisogn | | | 206.509 | 217.457 |
| Skuld | | | 208.825 | 219.005 |